# Hamskift og undirmannað NSÍ setti trumf á

**Eftir sera trilvandi fyrra umfar smoygdu teir í NSÍ sær eftir steðgin í arbeiðshamin, og tað bar tvey mál og sigurin við sær, sum HB hevði allar fyritreytir at vinna, tá dómarin hevði sent Pól Thorsteinsson av vøllinum**



*Gert Langgaard stríkur avstað við bóltinum. Hann og hinir NSÍ-ararnir mannaðu seg rættiliga upp í seinna hálvleiki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

LØGMANSSTEYPIÐ FINALA
*Jóannes Hansen*

NSÍ er steypavinnari 2002. Teimum verður ynskt hjartaliga tillukku við sigrinum og við fyrstu atgongumerkjunum út í Europa. Tá Jens Martin Knudsen í dýrdarveðrinum um hálvgum seks tíðina ólavsøkudag stóð við steypinum kundi ikki annað staðfestast, enn at sigurin var ruddiliga uppiborin. Teir báðar tímarnar frammanundan hevði hann tvær ferðir tóktst kámur.

Men tað høvdu sigurssælu vinnarararnir onga orsøk at hugsa um. Tá tað stóð nógv á, høvdu teir smoygt seg í vásaklæði. Ein stríddist fyri allar og allir fyri ein, og tað eydnaðist at seta HB upp á pláss. Havnarmenninir, sum við lutakasti undan dystinum vóru gjørdir til heimalið, fánaðu alt meiri, og í 2. hálvleiki megnaðu teir ongantíð at seta Jens Martin Knudsen upp á stórar royndir.

Seinna umfarið var størri tyngd og vilji í vinnaraliðnum. Helgi L. Petersen var framúr arbeiðssamur, dynamiskur og skjótur, Sjúrður Jacobsen var í vinstru akkurát so kaldur og góður, sum hann plagar at vera, Ulrik Balling vísti seg at vera álopsstyrkurin, sum tey bæði leikbannini kravdu, og høgra síða var væl betri við, enn hon hevði verið í fyrra umfarinum.

Umstøðurnar gjørdu, at tað var neyðugt við nýggjum kreftum á vøllinum, og NSÍ venjarin vísti, at hann hevði treytaleyst álit á beinkinum. Tríggir ómóðir spælarar vórðu sendir á vøllin, og teir vóru í góðveðrinum við til at fáa sigurin til høldar.

### Skelkirnir

Fyrra ferðin, at sigurin tóktist langt burtur hjá NSÍ, var, tá spælararnir fóru av vøllinum eftir fyrru trý korterini. Tá var lítið, sum bendi á, at teir gulu og svørtu skuldu fara við øllum.

Spælið hevði sum heild ikki verið tað, sum roknast kann við, at tað er, tá tvey topplið eru á grasinum. Persónligu mistøkini vóru nógv, og ferðin í góðveðrinum var einki at rópa hurrá fyri.

Serliga var tað NSÍ, sum hevði trupulleikar. Høgra borð var eyðkent av, at álopsparturin var púra lamin, og miðverjan var ikki sannførandi. Ov ofta – ella rættari næstan hvørja ferð – varð bólturin sparkaður heldur enn spældur fram á vøllin. Tað hevði aftur við sær, at fyritreytirnar hjá miðvallarunum vóru alt annað enn góðar. Kári Hansen arbeiddi á verjukenda plássinum,og í vinstru var Jónstein Petersen um reppið onkra ferðina at sleppa einsamallur ígjøgnum, men tað varð ikki meiri enn nær við og næstan.

Í álopinum gav Ulrik Balling onkra hóming av, at hann hevði evnini at hótta og avgera, men fjálturin longri afturi á vøllinum hevði við sær, at lítil ella eingin tyngd var í álopspartinum, og tað var væl skiljandi, tá venjarin fram ímóti steðginum setti Helga L. Petersen fram og tók Ian Højgaard aftur á miðvøllin.

HB spældi ikki á nakran hátt væl. Men teir høvdu betri tak á bóltinum. 1–0 leiðslan var staðfesting av, at roynda steypaliðið hevði verið spælførandi. Jan C. Dam og Jóhannis Joensen høvdu ongantíð verið settir undir trýst. HB hevði bóltin meiri, men tað var lítil tyngd í álopspartinum. Vongverjarnir vóru ongantíð vandamiklir, og í álopinum vóru Jón Rói Jacobsen og Andrew av Fløtum rættiliga tamir.

Hallur Danielsen var í vinstru mest skapandi HB spælarin, og tað var hann, sum sendi innfyri, tá Rógvi Jacobsen stútaði til 1–0. Inngangurin til støðuna, sum bar málið við sær, var sigandi fyri NSÍ avrikið í 1. hálvleiki. Arnfinn Langgaard hevði ikki nóg mikið av áliti á sær sjálvum og málverjanum til úr ikki serliga kroystari støðu at spæla aftur til málverjan, men beindi bóltinum út til óneyðugt innkast við hornaflaggið. Tann støðan hevði trý HB horna í høgru við sær, og í triðja førinum endaði bólturin í hinum borðinum, og tá var tað, at Hallur Danielsen smoygdi sær framvið einum mótstøðumanni, áðrenn hann legði innfyri og í pannuna á Rógva Jacobsen.

Seinni NSÍ skelkurin átti at komið miðskeiðis í 2. hálvleiki. Birgir Sondum, sum hevði gott tak á dømingini, sendi Pól Thorsteinsson av vøllinum. Tá sá svart út hjá NSÍ, men støðan tók seg merkiliga væl upp. Djóni N. Joensen varð settur í miðverjuna, og NSÍ hevði bara ein á toppinum. Men tað tóktist ikki bila, tí tað vóru fleiri, sum løgdu stórar arbeiðsbyrðar á seg, og tað var ikki undarligt, at HB menninir eftir dystin iðraðu seg um, at teir á ongan hátt megnaðu at gera nyttu burturúr, at teir vóru yvirmannaðir.

### Avgerandi støðurnar

Fyri NSÍ og spenningin var tað avgerandi, at útjavnandi málið kom beinanvegin í 2. hálvleiki. Tríggir minuttir vóru farnir, tá Ulrik Balling við góðum skoti úr høgru og dygst niðri við stólparótini gav HB fyrstu ávarðingina. Og avleidda hornasparksstøðan bar útjavnandi málið við sær. Eftir út frá í høgru longdi Helgi L. Petersen við høvdinum heilt inn undir málið, har Ulrik Balling var fyrstur á, og so fór rættuliga at prutla undir gulu og svørtu grýtuni.

HB legði um frá 4–4–2 og til 4–3–3 við Pæturi M. Dahl sum triðja manni í álopsketuni, og Hallur Danielsen varð fluttur í høgra borð. Umskipingini skuldi rættuliga standa sína roynd, tá NSÍ var skert, men fáu málmøguleikarnir stóðust í hinum endanum.

Sjúrður Jacobsen sendi yvir 45 metrar fríspark til innskifta Bergur Djurhuus, sum var so mikið leysur í høgru, at bólturin stakk tvær ferðir í svørðin, áðrenn Bergur úr góðari støðu smekkaði til. Bólturin fór skeivu megin stólpan, men støðan bar boð um, at HB ikki fór at fáa sigurin og harvið steypið og Europa Cup luttøkuna borna upp í føvningin.

Tað restaðu fimm minuttir, tá Sjúrður Jacobsen nakað úr vinstru sendi fríspark í HB brotsteigin. Eftir nærdyst millum Jóhannis Joensen og Helga L. Petersen brírkslaði dómarin fyri brotssparki, og Brynjolvur Nielsen, sum avgjørt var millum teir, ið blomstraðu í 2. hálvleiki, megnaði at bera stóra trýstið. Bárður Johannesen varð sendur til vinstru fyri seg sjálvan, meðan bólturin streyk í netið í hinum borðinum.

NSÍ fagnaðurin mundi ikki steðga. Fyri fyrstu ferð nakrantíð høvdu teir vunnið sær rætt til Europa Cup luttøku. HB, sum er tað liðið, ið oftast hevur umboðað Føroyar í europeisku kappingunum, varð sett upp á pláss. NSÍ fór í arbeiðshamin í 2. hálvleiki, og hóast teir leingi vóru undirmannaðir, so fingu teir fulla úrtøku burturúr. Eftir góðu úrslitini í kapplóðrinum ólavsøkuaftan, trumfaðu teir í fótbóltinum ólavsøkudag. Tað var flott!



*Hallur Danielsen og HB taptu aðru steypafinaluna í trý ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*





*Stóra áskoðarafjøldin úr Runavík setti rættiliga stóran dám á steypafinaluna í ár*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# - Seinni hálvleikur var avgerandi

**Jónstein Petersen spældi í vinstra borði hjá NSÍ í steypafinaluni, og hann sigur, at eftir ein heldur vánaligan fyrra hálvleik spældi NSÍ væl í seinna hávleiki**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Heini í Skorini*

Jónstein Petersen, sum fyri fyrstu ferð vann nakað fyri besta NSÍ liðið, helt, at hálvleikurin var vendipunktið í dystinum.

- Eftir ein illa spældan fyrra hálvleik, har vit als ikki megnaðu at vísa nakað, komu vit ógvuliga væl við í seinna hálvleiki, og innsatsurin var ein heilt annar eftir steðgin, segði ein glaður Jónstein Petersen eftir sigurin. Jónstein vísti á, at eftir ein vælleiktan seinna hálvleik hevði NSÍ uppiborið at vinna dystin.

### Brotsspark og reytt kort í lagi

Sambært Jónstein Petersen vóru nógv umstíddu dómaraavgerðirnar í lagi.

- Pól Thorsteinsson kom við eini eftirtakkling, og tað var í lagi, at hann fekk seinna gula kortið. Hóast eg ikki rættiliga sá brotssparkið, skilji eg á lagnum, at Helgi varð hildin, og tá er tað brotsspark, so dómaraavgerðirnar vóru ok, sigur Jónstein Petersen at en-da, sum fyri fyrstu ferð vinnur eina føroyska kapping á besta NSÍ liðnum.

**LØGMANSSTEYPIÐ FINALA:**

**Á Tórsvølli ólavsøkudag 2002, kl. 16.30**

**HB–NSÍ 1–2 (1–0)**

**Dómarakvartett:** Birgir Sondum, Regin Egholm, Georg N. Rasmussen og Jógvan Næs
**4.207 áskoðarar**
1–0: Rógvi Jacobsen 34.
1–1: Ulrik Balling 49.
1–2: Brynjolvur Nielsen br 82.
**HB:** 1. Bárður Johannesen – 12. Tór–Ingar Akselsen, 11. Jóhannis Joensen, 14. Jan C. Dam, 5. Hans á Lag – 6. Nicu Dogaru (17. Pætur M. Dahl, 63.), 7. Rúni Nolsøe, liðformaður, 8. Rógvi Jacobsen, 18. Hallur Danielsen (28. Eyðun Samuelsen, 88.) – 19. Jón Rói Jacobsen, 10. Andrew av Fløtum
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 21. Pól Næss Joensen, 3. Ingi Rasmussen, 4. Janus M. Joensen, 9. Uni Arge, 16. Bjarni Jørgensen
Gult kort: Jóhannis Joensen 16. Andrew av Fløtum 33., Nicu Dogaru 55., Hallur Danielsen 84.
**Venjari:** Ion Geolgau
Hjálparvenjari: Kári Nielsen
Fysioterapeutur: Hjørleif Niclasen
Liðleiðarar: Skylv Hartvigsson og Sigurð Hansen
**NSÍ:** 1. Jens Martin Knudsen, liðformaður – 15. Brynjolvur Nielsen, 2. Arnfinn Langgaard, 14. Pól Thorsteinsson, 18. Sjúrður Jacobsen – 7. Gert Langgaard, 5. Kári Hansen (4. Djóni N. Joensen, 70.), 12. Helgi L. Petersen, 8. Jónstein Petersen (11. Eddie Mikkelsen, 85.) – 24. Ulrik Balling (26. Bergur Djurhuus, 74.), 6. Ian Højgaard
Á beinkinum uttan at verða skiftir inn: 16. Jákup Emil Hansen, 3. Ken Nónklett, 13. Mortan Hansen
Gult kort: Arnfinn Langgaard 28.
Reytt kort: Pól Thorsteinsson 68.
**Venjari:** Jógvan Martin Olsen
Hjálparvenjari: Bill Jacobsen
Liðleiðari: Dan M. Olsen
Fysioterapeutur: Marjun Thomassen

# - Vit góvu ikki alt

**HB verjuleikarin Hans á Lag segði eftir finaluna, at avrikið var vánaligt, og at HB innsatsurin als ikki var heilhjartaður**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Heini í Skorini*

- Eingin okkara kann erliga siga eftir dystin, at vit góvu alt, tú tað gjørdu vit ikki, segði HB verjuleikarin Hans á Lag eftir finaluna móti NSÍ, sum runavíkingar vnnu 2-1. Hans á Lag segði, at innsatsurin var høvuðsmunurin á liðunum báðum, og at hann sjálvsagt er sera vónbrotin av úrslitinum.

HB verjuleikarin vísti m.a. á, at HB ikki hevði uppiborið at vinna dystin, tí teir stutt sagt ikki spældu nóg væl, og hann segði eisini, at tað sást alt ov illa aftur, at HB spældi við ellivu monnum móti tíggju í ein góðan hálvan tíma.

### Grasið darvar

Spurdur, hvat hann helt um brotssparkið, svaraði Hans á Lag, at hóast teir í HB ikki vóru samdir í avgerðini hjá dómaranum, gevur hann ikki honum skuldina.

- Handa avgerðin varð tikin, og tað gerst so ikki við tað. Hóast eg ikki eri samdur við avgerðini, ynski eg ikki at viðmerkja brotssparkið nærri, sigur Hans á Lag. Sambært stóra HB verjuleikaranum ávirkaði undirlagið eisini dystin, og Hans sigur, at tá spælararnir als ikki eru vanir við gras, samstundis sum vøllurin ikki var heilt sléttur, kemur flótandi fótbóltsspælið ikki til sjóndar.

- Hevði dysturin verið spældur á graslíkinum á ovara vølli, hevði dysturin verið betri leiktur. Vit høvdu torført við at fáa bóltin at trilla á grasinum, og undirlagi ávirkaði avgjørt fótbóltsspælið í hesi finaluni, viðmerkti Hans eisini.

Samanumtikið var Hans á Lag ein ógvuliga vónbrotin maður eftir steypafinaluna, sum NSÍ vann við tveimum málum móti einum.